## DAGSINS MEINING

# Útoyggjamenning

Tað eru nú nøkur ár síðani, at orðið BYGDAMENNING var frammi í nærum øllum greinum og lesarabrøvum fyri ikki at siga í hvørjari røðu á tingi. Víst varð á vandan við, at alt og øll fluttu til Havnar ella til miðsteðarøkið. Og at henda óhugnaliga gongd forðaði fyri menning av bygdunum kring landið. Ja hon var við at avtofta bygdir og búpláss kring landið.

Munandi betraða undirstøðukervið kring landið við brúm, góðum og breiðum vegum, ferjulegum, tunlum og nú eisini undirsjóvartunlum megnaði í ávísan mun at steðga hesi óhepnu gongd, soleiðis at vit í dag sum heild hava eitt ríkt og livandi virksemi úti kring landið. Hetta tó ikki minst bygdafólkunum sjálvum fyri at takka, tí teirra støðufesti, trúgvin uppá egna megi og mátt og góðu búplássini kring oyggjarnar, hevur verið veruliga drívmegin. Sjálvandi saman við bøttu ferðamøguleikunum kring oyggjarnar.

Men ikki alla staðni hevur verið so atkomuligt og so frægt av fólki, at tað hevur borið til at varðveita smáplássini og her serstakliga útjaðaran. Vit hugsa um bygdinar í eitt nú Svínoy, Fugloy, Skúvoy, Mikinesi fyri bert at nevna nakrar. Eisini eru dømi um bygdir í størri oyggjum, sum eru nervaðar av, at fólkið flytur.

Tosað hevur verið um frá almennari síðu at gera nakað ítøkiligt fyri at steðga útoyggjadeyðanum. Vitandi at hetta ikki er lætt, tá bara eldra ættarliðið er eftir, tí besti vegurin at ganga er jú tá fólkini á staðnum sjálvi standa fyri menningini, so má tað almenna so ella so geva eina hjálpandi hond. Útoyggjarnar og bygdirnar har eru ein so týðandi partur av okkara søgu og mentan, at vit mugu gera alt vit eru ment fyri at steðga afturgongdini.

Landsstýri og politikararar hava borið fram føgur orð men tíverri verður hetta ikki til stórt meira. Ov nógv orð, ov fáar gerðir. Sitandi landsstýri hevur heldur ikki víst hesum álvarsmáli nóg stóran ans. Men hetta stóra álvarsmálið má ikki sleppa at doyggja ella verða gloymt í almenna orðaskiftinum. Útoyggjarfólk og tey, sum á ein hvønn hátt hava tilknýti til útoyggjarnar og sum skilja teirra søk og vilja stuðla henni, mugu bara aftur og aftur geva ljóð frá sær. Og eitt slíkt høvi verður á Útoyggjastevnuni í Svínoy komandi vikuskifti. Tað skal vera okkara vón, at eitt nú slík stevna verður við til at seta Útoyggjarnar á landakortið og at røddir haðani fara at verða hoyrdar so langt sum til høvuðsstaðin, har stóru og týðandi avgerðinar í samfelagnum verða tiknar.

Vit ynskja tykkum øllum eina góða útoyggjastevnu og vóna, at veðrið verður til vildar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til yvirlýsing hjá Miðflokkinum

***Jógvan á Lakjuni***
*landsstýrismaður*



Bæði í Dimmalætting (28. mai) og í Sosialinum (1. juni) hevur Miðflokkurin havt eina yvirlýsing, har tingmenninir, Jenis av Rana og Bill Justinussen, leggja landsstýrið undir **við vilja** at hava hildið týðandi upplýsingum aftur fyri løgtinginum í málinum um Miðnámsskúlan í Suðuroy.

Eg fekk høvi til at gera viðmerkingar til hetta í útvarpinum næstsíðsta leygarkvøld, men haldi tað eisini vera rætt - hóast nakað seinur á sjóvarfallinum - at vísa hesum grovu og ósonnu ákærum aftur í bløðunum, tí tað passar ikki, at upplýsingar við vilja eru hildnar aftur fyri løgtinginum.

Í sambandi við ætlanina um skúladepil og ellis- og røktarheim í Suðuroynni bað landsstýrið Arkitektavirkið Árna Winther um eina meting, sum m.a. skuldi lýsa møguleikar og ivamál. Hesa metingina fingu vit í einum uppriti 24. február í ár.

Tað er hesa arkitektafrágreiðingina, sum Miðflokkurin leggur okkum undir við vilja at hava hildið aftur fyri løgtinginum. Men hetta er ósatt!

15. mars hevði landsstýrið fund við allar kommunurnar í Suðuroy um málið, har eisini umboð fyri Arkitektavirkið legði sínar metingar fram, og enntá var eitt modell av einum møguligum ellis- og røktarheimi víst fram. Hetta hevur eisini verið frammi í bløðunum.

Uppskot til løgtingslóg um at byggja skúladepil í Suðuroy varð lagt fyri tingið 27. apríl í ár, og 1. viðgerð var 3. mai. Í viðmerkingunum til lógina stendur m.a.: "Av tí at Arkitektavirkið hjá Árna Winther hevur staðið fyri prosjekteringini av miðnámsskúlanum í Vági, hevur Mentamálaráðið heitt á Arkitektavirkið um at gera eina byggitekniska meting í sambandi við, at ætlanin er at byggja ein skúladepil í Suðuroy,…"

Tað stendur sostatt svart upp á hvítt í sjálvum lógaruppskotinum, at ein byggitekninsk meting er gjørd í sambandi við málið. Kortini loyva tingmenn Miðfloksins sær at skriva: "Ongantíð undir allari viðgerðini kom fram, at ein arkitektafrágreiðing, umbiðin av landsstýrinum, var gjørd, og sum kundi hava avgerandi ávirkan á støðutakanina hjá tingfólki".

Undir fyrstu viðgerð í tinginum 3. mai nevndi eg, at hesar ætlanirnar vórðu bygdar á metingar frá Arkitetavirkinum.

Tann 4. mai var eg sjálvur á fundi í mentanarnevndini, har málið var til viðgerðar, og har allir viðkomandi spurningar kundu setast. M. a. bað nevndin um upplýsingar um ognarviðurskiftini í sambandi við tað útgrivna stykkið í Vági.

9. mai var aftur fundur í mentanarnevndini, har m. o. Árni Winther eisini var innkallaður á fund.

6. mai - meðan málið var til viðgerðar í mentanarnevndini, og 6 dagar undan 2. viðgerð í tinginum - fekk landsstýrismálanevndin, sum hevði biðið um innlit í øll skjøl í málinum, frágreiðingina hjá Arkitekvirkinum sendandi frá Mentamálaráðnum, og varð hon løgd á heimasíðuna hjá løgtinginum sama dag.

Undir aðru viðgerð í tinginum tann 12. mai segði eg orðarætt hesi orðini: "Tað er soleiðis, at Arkitektavirkið hjá Árna Winther hevur verið inni í hesum, og nógvir av spurningunum liggja í svarinum frá teimum. Eg kann eisini vísa til ..., at landsstýrismálanevndin hevur fingið útleverað øll tey skrivini, og tey liggja ivaleyst á heimasíðuni hjá løgtinginum".

Tingfólk, ið fylgdu við og settu seg inn í málið, vistu sostatt, at frágreiðingin frá Arkitektavirkinum var eitt av skjølunum, sum var og er til taks í málinum.

Men tað er ikki bara hetta, sum er ósatt í yvirlýsingini frá Miðflokkinum. Har verður eisini sagt, at Landsstýrismálanevndin er komin til somu niðurstøðu sum Miðflokkurin, t.v.s., at løgmaður og landsstýrið við vilja hava hildið upplýsingum aftur. Men hetta er als ikki niðurstøðan hjá Landsstýrismálanevndini. Tað kann ein og hvør síggja við at lesa tað málið!

Eg haldi, at Miðflokkurin skyldar okkum eina umbering, tí landsstýrið hevur á ongan hátt havt ætlanir um at halda upplýsingum aftur í hesum málinum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.